## Newcastle hevur kós uppaftur

Newcastle hevur seinnapartin vunnið seg upp á fyrsta plássið í næstbestu ensku deildini. Vitjanin í Cardiff seinnarpartin varð sera væleydnað, tí gestirnir vunnu við 1-0. Fabricio Coloccini stóð fyri einasta málinum hjá Newcastle. Newcastle hevur 16 stig eftir seks dystir. Tað eru tvey og trý stig fleiri enn nærmastu kappingarneytarnir, West Bromwich og Middlesbrough.




## Abramovich svímaði

Tað gekk ikki eftir vild, tá 42 ára gamli Chelsea-eigarin, Roman Abramovich, í seinastu viku royndi at vinna upp á hægstu tindarnar í Afrika. Á ferðini niðan á Kilomanjaro kendi russiski ríkmaðurin seg brádliga illa og fekk andaneyð. Í skundi varð hann fluttur nakrar túsund metrar niður, har læknar stóðu til reiðar at geva neyðugu hjálpa.



# Í mótvindi

**Føroyameistarakapping var í landavegssúkkling leygardagin. Vinnari gjørdist Torkil Veyhe, sum í nógva vindinum av høgætt nýtti eitt vet meira enn tríggjar tímar til teinin**


eij@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu

Klokkan 10 fóru teir avstað. Átta grammir súkklarar, sum allir høvdu møguleikan at gerast Føroyameistari í landavegssúkkling, men tað kann bara vera ein, og hesin skuldi finnast komandi hundrað kilometrarnar.

Beint áðrenn teir fóru avstað komu boðini frá Geyr Gilsteinson, at teir allir skuldu fylgjast í Havnini og at teir sluppu at gera sum teimum lysti, tá teir komu til Sandvíkarhjalla.

Inni í Havnini var teinurin eftir hvítanesvegnum, niðan á ringvegin, framvið Landssjúkrahúsinum, oman í Vágsbotn, yvir við Strond og síðani eftir Hvítanesvegnum.

Eftir hetta gekk leiðin norð til Langasands at venda, áðrenn klárt var at fara suður aftur í høvuðsstaðin.

### Nógvur vindur

Á teininum norður fóru fýra

Myndir: Álvur Haraldsen

Torkil Veyhe er 20 ára gamal, men í løtuni er hann sterkasti súkklarin í Føroyum

